



*Hesar báðar hýsurnar fekk útróðrarbáturin, Gudrun úr Klaksvík, á sama línustampi út fyri Rytuvík*
*Myndir: Rógvi Mouritsen*

# Dálking pínir fiskin í havinum

**Tann, sum fæst nakað við fisk, sær av og á, at fiskur av eini ella aðrari orsøk kann vera skaddur á ymiskan hátt**

SKADDIR FISKAR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í desember í fjør sendi skiparin á útróðrarbátinum, Gudrun í Klaksvík, Kristin Vilhelmsen, Fiskirannsóknarstovuni tvær hýsur, sum vórðu fingnar á sama línustampi – út fyri Rytuvík í november.

Rógvi Mouritsen á Fiskirannsóknarstovuni sigur, at hesar báðar hýsurnar á ein ella annan hátt høvdu fingið ein gummiring tvørturum kroppin.

- Diameturin á ringunum var nóg stórur til at sleppa afturum høvdið, men ikki nóg stórur til at fara afturav. Sostatt høvdu ringarnir sett seg fastar um uggarnar. Í øðrum førinum sat ringurin soleiðis, at búkfjaðrarnar lógu ímillum og kundu tí ikki brúkast.

Rógvi sigur, at annar ringurin var ein svartur tettningsringur til onkra rørsamankoming, og hin var ein pakningur av einum loki - líknandi teimum, ið eru undir lokinum á grønmetisgløsum.

- Ringarnir høvdu ivaleyst ligið nakað leingi í sjónum, um vit skulu meta eftir tí vøkstri, sum sat á teimum.

Rógvi sigur, at ringarnir í báðum førum høvdu sett týðilig merkir í fiskarnar; støðini vóru avtikin, og fiskarnir høvdu fingið sár.

- Tí kann væntast, at hýsurnar hava havt ringarnar uppi á sær í eina tíð, heldur hann.

### Ikki óvanligt

Rógvi sigur, at tað er ikki so óvanligt at síggja fiskar, sum hava fingið okkurt sovorðið um kroppin.

- Á einum túri hjá havrannsóknarskipinum, Magnusi Heinason í mai 2004, har skipið royndi við flótitroli heilt uppi undir vatnskorpuni einar 100 fjórðingar í útnyrðingnorðan úr Mykinesi, var ein lítil laksur í, sum hevði ein reyðan plastring um kroppin.

Hann sigur, at laksurin var týðiliga merktur av hesum ringi.

- Hann var rak, og uggafjaðrarnar sótu innanfyri ringin, so tær ikki kundu brúkast til tað, tær eru ætlaðar til.

Á Fiskirannsóknarstovuni hava tey gjøgnum tíðirnar sæð fleiri slíkar tilburðir, har fiskur hevur havt okkurt hangandi uppí á sær. Eitt nú hava pettir av gørnum ella nakrir meskar hingið uppi á fiskinum.

Rógvi sigur, at tann eini fiskurin hevði eina bukt av eini snelludorg uppi á sær.

- Ja, vit hava enntá fingið ein seið, sum hevði ein ring av eini narrisuttu uppi á sær, sigur hann.

### Nylonbukt á síli

Hann sigur, at fyri einum 30 árum síðan var eitt sjósíl, sum hevði fingið eina nylonbukt upp á seg.

- Ovari parturin av buktini hevði etið seg niður í fiskin so hvørt, sum hann vaks og stóð at enda mitt ígjøgnum fiskin - frá síðu til síðu. Vaksið var afturíaftur sárið omanfyri, bæði við fiski, skræðu og roðslu. Um búkin hevði buktin gjørt stórt og ljótt sár, og var næstan komin inn ígjøgnum.

Rógvi Mouritsen sigur at enda, at tíverri var eingin mynd tikin av hesum síli.



*Hesin toskurin hevur fløkt seg upp í eitt nylonnet – og hann hevur ikki havt tað gott, sæst á myndini*
*Mynd: Rógvi Mouritsen*



*Hendan laksin, sum hevur fingið ein plastring um kroppin, fekk Magnus Heinason, tá ið teir royndu við flótitroli uppi í vatnskorpuni, 100 fjórðingar í ein útnyrðingnorðan úr Mykinesi*
*Mynd: Rógvi Mouritsen*

# Ósemja um rættindi til trollemmar

STRÍÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jan Allan Muller og Helgi Larsen, sum í sínari tíð uppfann og fekk patent upp injector-trollemmarnar, hava sent út eitt tíðindaskriv.

Í skrivinum vísa teir til tíðindini um, at Føroya Sparikassi og Sp/f Rock hava framleiðslurættindini til Injector lemmarnar.

- Vit kunnu ikki góðtaka hesa kunngerð og frásiga okkum alla ábyrgd, um nakrar injector trolhurðar skuldu komið frá Sp/f Rock og Føroya Sparikassa.

Teir vísa á, at Injector ApS er einasta felag, sum hevur framleiðslu-og sølurættindini til Injector trolhurðarnar, world wide, sum tikið verður til í skrivinum.

- Ein og hvør, sum byrjar at framleiða Injector trolhurðarnar uttan loyvi frá okkum, ger seg inn á rættindini, sum patenteigarin og licensbrúkarin hava.

Tíðindabrævið er undirskrivað av Jan Allani Muller, vegna Injector ApS og Helga Larsen, vegna Injector ApS og Patent PCT/DE9700196.

### Stríðsmál

Í samrøðu við Dimmalætting leygardagin, sigur sakførarin hjá uppfinnaranum, Anfinn V. Hansen, at loyvið, sum Føroya Sparikassi hevur givið Sp/f Rock við stjóranum, Hans J. Joensen, er ólógligt.

Fyritøkan hjá Jan Allan Muller, Injector ApS, hevur keypt rættindini frá Helga Larsen at framleiða og selja umrøddu trollemmar.

Anfinn V. Hansen sigur, at hevur Føroya Sparikassi givið aðrari fyritøku rættindini til at framleiða og selja trollemmarnar, fer málið í rættin.

Føroya Sparikassi hevur trygd í patentinum upp á trollemmarnar, og í greinini sigur Anfinn V. Hansen, at hetta er fyri skuld, men sakførarin leggur dent á, at Helgi Larsen eigur rættindini til patentið.

Dimmalætting hevur fingið innlit í eitt skjal, sum sigur, at "Føroya Sparikassi sum veðhavari er sinnaður at lata Helga Larsen fáa kjans til at gera nýtslu av patentinum, heruppí at lata øðrum felag nýtslurættindi til patentið, áðrenn Føroya Sparikassi tekur stig til at søkja fullnað í patentinum…"

### Undir framleiðslu

Hans J. Joensen sigur við blaðið, at Sp/f Rock blandar seg ikki upp í trætuna millum Føroya Sparikassa, Helga Larsen og Jan Allan Muller, men at felagið fer at framleiða trollemmar so skjótt, keyparar eru.

Bogi Bendtsen, undirstjóri í Føroya Sparikassa, sigur við Dimmalætting, at tá ið lánistovnurin hevur fingið veð í einum aktivi í samband við lánveiting, er tað náttúrligt, at stovnurin verjir síni rættindi.

- Men vit kunnu einki ítøkiligt siga um ávís mál, leggur hann aftrat.